kring oyggjarnar

Geva nú eisini út bókling til lorankortini

Skjótt kunna teir, sum brúka lorankortini hjá Vaktar- og bjargingartænastuni, sláa upp í einum bóklingi fyri at siggja, hvar haldini eru. Bóklingurin verður um heilt stutta tíð at fáa hjá H. N. Jacobsens bókahandli.

Í bóklinginum er bæði position og longd og breidd á teimum yvir 700 haldunum á føroyska landgrunninum. Í bóklinginum eru eisini positiónirnar hjá fýra loranketum.

Tá Vaktar- og bjargingartænastan á sinni gav út fiskikortini varð eisini gjørdur ein bóklingur um haldini, t.e. botn viðurskifti, har trol kunna festast ella skrædna, til deccakortini. Fiskimenn hava síðani fleiri ferðir heitt á Vaktar- og bjargingartænastuna um at gera ein líknandi bókling til lorankortini og hetta er nú gjørt.

Svartkjaftakvotur ikki uppfiskaðar

Svartkjaftaveiðan undir Føroyum er nú fyri tað mesta liðug í ár. Nú eru tað bert russar, eysturtýskarar og pólverjar, sum royna.

Heldur ikki í ár brúktu íslendingar meira enn ein lítlan part av sínari kvotu. Teir áttu 35.000 tons, men veiddu bert 3.700. Tað ljóðar úr Íslandi, at har eru ongi skip, sum egna seg til svartkjaftaveiðu.

Heldur ikki EEC brúkti alla sína kvotu. Felagsskapurin átti 30.000 tons, men knappliga helvtin av teimum er fiskað, tað mesta av donskum bátum, sum veiddu 8.600 tons.

Norðmenn hinvegin lótu ikki sína kvotu uppá 90.000 tons gleppa sær úr hondum. Teir hava boðað landsstýrinum frá, at teirra veiða er 87.000 tons. Russar, sum hava 80.000 tons, hava til nú fiskað 50.000 tons.

Sviar høvdu loyvi at fiska svartkjaft undir Føroyum við tveimum skipum, men teir brúktu ikki hetta loyvi.

Bitið í kjálkan

Fríggjadagin beit ein hundur í Klaksvík eitt 2 ára gamalt barn í kjálkan.

Barnið var farið til hundin, meðan hann stóð bundin úti.

Barnið fekk ikki stórvegis mein av hendingini, men hundurin verður kortini skotin eftir avtalu við eigaran.

Nú kunna øll hoyra Útvarpið á FM

Arbeiðið við at útbyggja FM-sendinetið í Føroyum er nú liðugt.

Nú hava allar bygdir í landinum møguleika at hoyra Útvarpið á FM.

Høvuðsstøðin liggur á Húsareyni og hon hevur beinleiðis samband við útvarpshúsið á Bryggjubakka. Aftur at høvuðsstøðini eru so 10 endursendistøðir kring landið.

Allar bygdir kunna nú hoyra Útvarpið á FM, men tað eru kortini ikki allar, sum kunna hoyra tað í stereo. Tær bygdir, sum liggja illa fyri í mun til FM-stødirnar, hoyra framvegis allar sendingarnar í mono.

Í umbúna at stovna náttúrufriðingarfelag

Í umbúnað er at stovna eitt felag, sum skal taka sær av friðingartiltøkum í náttúruni.

Tað er felagið Føroya Náttúra — Føroya Skúli, sum hevur tikið stig til fyrireikingarnar.

Fyribils hava fyrireikararnir sett seg í samband við fólk úti á bygdunum kring landið og spurt, um tey vilja vera við at stuðla og hjálpa felagnum.

Enn er óvist, nær felagið verður stovnað. Fyrireikararnir hava sett sær fyri at fyrireika felagið væl, áðrenn sjálv stovningin fer fram, men væntandi verður hon einaferð næsta ár.

Klaksvíkin vælegnað til bussrutukoyring

Býráðslimir lagt uppskot um bussrutu

Teir báðir býráðslimirnir í Klaksvík, Michael Matras og Vilhelm Johannesen hava skotið upp fyri býráðnum, at býráðið heitir á samferðslunevndina um at gera eitt uppskot til eina kollektiva ferðsluskipan fyri Klaksvíkar kommunu við t.d. tveimum kommunalum bussum.



Bussrutan skal røkka Norðoyri

Eisini hava teir skotið upp, at skúlabørn alt í mun til hvussu langt frá skúlanum tey búgva annaðhvørt fáa ókeypis flutning og ella avsláttarskipan.

Ikki á býráðsfundinum í gjár

Klaksvíkar kommuna er vælegnað til bussrutuflutning. Býurin liggur runt um vágna og tað skuldi ligið væl fyri at lagt eina bussrutu við tveimum bussum, soleiðis at annar koyrir av Bumshamri um somu tíð sum hin fer á av Kósini. Teir møtast í miðbýnum.

Hugsað verður eisini um at gera túrar til plássini uttanfyri Klaksvík, tað eru Árnafjørð, Grøv, Norðoyri og Ánirnar.

Býráðsfundur var í Klaksvík í gjárkvøldi, men tá var málið ikki fyri á skránni, hóast tað í gjár vóru tríggjar vikur síðani, at uppskotsstillararnir handaðu býráðsformanninum skrivið.

Annar av uppskotsstillarunum, Vilhelm Johannesen sigur, at tankin við bussrutuni er, at tey skúlabørn, sum búgva langt burturi, skulu fáa ókeypis ella ódýran flutning og at atgongugjaldið skal vera hægri, jú nærri børnini búgva við skúlan.

Bussruta hevur verið í Klaksvík fyrr. Hetta var í 40, 50 og 60-unum, tá koyrt varð við einum bussi. Raksturin gjørdist ov tungur, og tí helt henda bussrutan uppat. Ta fyrstu bussrutuna hevði Óla Jákup Jacobsen, ta næstu Zacharias Nielsen og tað seinastu Auto við Hjørleif Waag Høgnesen.



Bussruta skal eisini røkka Ánirnar

MÓTMÆLA SEV-ÚTBYGGING

Á seinasta býráðsfundi í Havn komu teir báðir býráðslimirnir, Jákup Sune Jacobsen og Leivur Johannesen við einum uppskoti í samband við ætlaðu SEV-útbyggingina av vatnorkuni í Føroyum. Málið var beint í figgjarnevndina.

»Undirritaðu býráðslimir vilja gera vart við, at sbr. tíðindum í útvarpi og bløðum hevur umboðsnevndin hjá SEV heimilað stjóra og stýri at gera sáttmála við útlendskt byggifelag um útbygging av SEV-verkinum fyri umleið 437 mill. kr. — roknað í dagsprísum — yvir eitt 10 ára tíðarskeið.

Upplýst verður, at arbeiðið skal gerast sum rokningsarbeiði.

Málið er ikki viðgjørt í býráðnum, og tí eru vit ikki førir fyri at meta, um hetta er rætt ella ikki, men vilja vísa til kunngerð nr. 49 frá 4.10. 1965, har § 11 viðger skyldur limakommununar. Í petti 3 stendur: »Fyri tær árligu útreiðslurnar til rentur og avgjøld av virkislánum felagsins borga limakommununar úteftir ein fyri allar og allar fyri eina og sínámillum í mun til íbútvaratalið.«

Eisini vilja vit vísa til reglugerð nr. 59, har m.a. stendur:

»Upptøka av virkislánum skal fara fram í samráð við stýrið, ið tekur avgerð sbr. heimild fingna frá umboðsnevndini, og skal lánupptøkan vera góðkend av landsstýrinum.«

Okkara viðmerkingar eru, at Tórshavnar býráð undir ongum umstøðum kann vera heft av nøkrum sáttmála, sum SEV ger í hesum sambandi, uttan so at Landsstýrið hevur góðkent nevnda sáttmála frammanundan.

Undirritaðu seta tí fram soljóðandi uppskot til samtyktar:

Tórshavnar býráð verður ikki at hefta fyri nøkrum sáttmála ella nøkrum, ið ikki samsvarar kunngerð og reglugerð góðkend av Landsstýrinum SEV viðvíkjandi«.

Jákup Sune Jacobsen
Leivur Johannesen

Kappríðingin við Leynarvatn

Í renning var STULKAN við Sjurð Holm á Baki nr. 1 við tíðini 40,7 sekund. Eigari Sjúrður Holm.

Nr. 2 Skemming við Rúna Nielsen á baki. Eigari Johan Olsen. Tíðin var 44,0 sekundir. Nr Nr. 3 var Asneida við Bjørn Patursson á baki. Eigari Viggo Lützen yngri, tíðin var 49,7 sekund.

Í kappingini fyri ung í tvíspor var nr. 1 STORMUR við Una Mohr á baki — eigari Lydia Mohr. Tíðin 19,6 sekund. Nr. 2 KAMBUR við Birgir Lützen á baki — eigari Torvald Lützen, tíðin 19,7 sekund, og nr. 3 FÚSA við Johan Olsen á baki — eigari Hanus Olsen, Vestmanna. Tíðin 20,3 sekund.

Í kappingini fyri vaksnar í tvíspor varð nr. 1 RANI við Jóhild í Dali á baki. Hon eigur sjálv. Tíðin var 18,5 sekund. Nr. 2 FENJA við Poul Hansen á baki, eigari Regin Hansen. Tíðin 18,6 sekund og nr. 3 var SKEMMING við Eyðfinni Dalsgarð á baki, eigari Ólavur Dalsgarð. Tíðin 19,8 sekund.